Skála-HB 1-3 (0-1):

# HB heldur tørn

**Meistararnir úr HB tykjast hava sett fulla ferð á skútuna, sum nú hevur beina kós móti gullinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Rógvi Jacobsen tykist trívast væl í nýggja leiklutinum í HB-álopinum*

Tað gongur við fullari ferð hjá HB í royndunum at vinna næsta FM-heitið á rað. Sunnudagin vitjaðu meistararnir á Skála, sum bert hevði ein sigur í sínum fyrstu ellivu dystum at vísa á, og her megnaði HB at liva upp til heitið sum favorittur.

### Nýtt undirlag

Á nýggja vøllinum á Skála vóru tað teir á oddaliðnum, sum høvdu nógv betri tamarhald á spælinum. Kanska var tað nýggja undirlagið, sum órógvaði, men í øllum førum sást sera lítið til kvika spælið, sum liðið í løtum hevur leikt, uttan at hetta tó hevur kastað tey heilt stóru úrslitini av sær.

Hjá HB gekst kanska heldur ikki so væl at spæla seg fram til teir stóru møguleikarnar, men teir høvdu fyri tað mesta tamarhald á støðuni, og við tryggleikanum hjá einum vinnaraliði í bakhøvdinum royndu teir fyri tað mesta at koyra bóltin runt, í vissuni um, at møguleikararnir eisini skuldu koma.

Og tað komu teir so eisini. Rógvi Jacobsen, sum tykist hava fingið fastan lut í álopspartinum hjá HB var hægstur, tá Tór-Ingar Akselsen sendi innfyri, og við høvdinum stýrdi hann niður í svørðin og í meskarnar.

Og so var HB á rættari kós. Tað, sum eftir var av fyrra hálvleiki høvdu teir fult tamarhald á, og mest sum beint eftir at teir komu út til seinna hálvleik, høvdu teir økt um munin. Hesa ferð var talan um deyðbóltsstøðu í høgru, og tá bólturin varð sendir inn í brotsteigin var Hans á Lag hægstur.

### Rógvi á toppinum

Og so var tann dysturin liðugur. At Skála slapp at hava bóltin meira eftir hetta førdi ikki við sær, at teir gjørdust searliga vandamiklir, og heldur var tað tann vegin, at gestirnir vóru nær við at økja, tá teir kontraðu niðaneftir vøllinum.

Júst hetta at eksplodera niðan eftir vøllinum er nakað, sum hevur verið ein av stóru styrkjunum hjá HB í ár, og tó at kviki Karsten From ikki longur er á liðnum, so tykist hetta vápnið als ikki at hava tikið skaða. Kanska heldur hinvegin, so hevur liðið nú eisini fingið aðrar streingir at spæla uppá, tí við Rógvi uppi á toppinum er liðið vorðið munandi meira vandamikið í loftspælinum, eins og tað í trýstum støðum so avgjørt er ein fyrimunur at hava ein álopsmann við fysisku styrkini hjá Rógva.

Og tað var eisini luftspælið hjá honum, sum førdi til 3-0 málið. Hesa ferð kom uppspælið úr vinstru, haðandi Rúni Nolsøe sendi innfyri. Í fyrstu atløgu fekk málverjin vart fyri stútaranum frá Rógva, men Andrew var skjótur at senda returin í kassan, og harvið ota seg enn longur upp á máltindinum.

### Reytt/svart bjartskygni

At Skála í evstu løtu fekk minkað um munin við einum vøkrum máli frá Sveini Justinussen, mundi bøta lítið um støðuna hjá liðnum.

Teir eru framvegis avbyrgdir á aftasta sessinum við trimum stigum. Fimm færri enn vágamenn á níggjunda plássinum. Enn er niðurflytingin ikki veruleiki, og eftir flotta endaspurtin í fjør skulu tey flestu nokk vara seg við at senda liðið niður upp á forhond, men tað er einki at ivast í, at tað stendur nógv á. Komandi dystin skulu teir til Havnar, har B36 tekur ímóti, og á pappírinum er tað so heldur ikki ein dystur, har Skála hevur stórvegis møguleikar.

Men tað er í løtuni HB, sum tað mesta snýr seg um. Meistararnir frá í fjør tykjast hava funnið gullspælið fram í júst røttu løtuni, og við fýra stigum niður til næstu sessirnar tykist liðið í løtuni at liggja heilt væl fyri. Kanska kann ein ábending um endaligu støðuna koma um tvær vikur, tá HB vitjar í Gøtu. Tað var júst her, at botnurin undir endaspurtinum – og harvið gullmerkjunum – varð lagdur í fjør, og verður talan enn einaferð um ein sigur í Sarpisgerði, man vera trupult at finna ein reyð/svartan havnarmann, sum ikki gongur við ætlanum um eina veitslu, tá kappingin endar tann 5. oktober.

### Skála-HB 1-3 (0-1)

0-1: Rógvi Jacobsen, 20
0-2: Hans á Lag, 50
0-3: Andrew av Fløtum, 70
1-3: Sveinur Justinussen, 90

**Skála:** Eugen Voda – Marius Joensen, Ronnie Hansen, Dusan Jaic, Julian Florescu – Hanus Thorleifsson, Pauli Hansen, Sveinur Justinussen – Bogi Gregersen, Arnhold Berg, Alexandur Johansen

**HB:** Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Hallur Danielsen – Rúni Nolsøe, Martin Christensen, Nico Dugaro– Tór-Ingar Akselsen, Rógvi Jacobsen, Andrew av Fløtum

B68-ÍF 1-0 (0-0):

# Framúr vikuskifti hjá B68

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað ber ikki til at siga annað, enn at vikuskiftið royndist heilt framúr hjá toftamonnum. Sunnudagin vunnu teir í 1. deild á útivølli ímóti B36, og leygardagin løgdu teir lunnar undir stóru úrtøkuna, tá ið teir næstbestu, sum høvdu vitjan av ÍF, tóku alt. Talan var um fyrsta sigurin hjá B68, og talan var samstundis um fyrsta tapið hjá ÍF.

Fótbóltsspælið er undarligt. Næstsíðsta leygardag hevði B68 vitjan av B36, sum teir hava dygst frammanfyri sær í botninum. B36 vann 4-0. Hesa ferð var tað oddaliðið, sum vitjaði, og so eydnaðist tað B68 at vinna 1-0.

Einsamalla málið skoraði ábyrgdarmaðurin fyri 2. deildarliðnum hjá B68, Aksel Højgaard, tíðliga í 2. hálvleiki. Innlegg kom úr høgru. ÍF verjan royndi at sparka burtur, men ólukkutíð fyri fuglfirðingar so rakti bólturin í ryggin á einum av teirra egnu, síðani støkk hann til Aksel Højgaard, sum takkaði fyri tilboðið.

Ongar ábendingar vóru í spælinum um, at tað var nummar eitt, sum var og vitjaði nummar tíggju. ÍF hevði umleið somu manning, sum teir hava havt í fyrra helmingi av kappingini, tá ið tað hevur gingið strúkandi. Munurin frá flestu av hinum ferðunum og so til hesa ferð var, at teir høvdu gloymt rætta hugburðin eftir við hús. Ivaleyst var tað ótilvitað, men tað er ein veruleiki, at gestirnir á Svangaskarði høvdu ógvuliga ilt við at finna stríðshamin fram, sum eisini skal til, tá ið møtstøðuliðið ongantíð áður á árinum hevur megnað at vinna.

Sammett við ímóti B36, tá ið B68 fór á vøllin við vónini um, at teir kanska kundu spæla seg til stig, so var tað væl einfaldari hesa ferð. Við Mannbjørn Nesá sum sera sannførandi aftasta manni, so vóru teir í verjuni avgjørdir, tá ið teir ruddaðu upp. Mortan Hansen í málinum var stinnur í luftspælinum, og longu útspørkini hjá honum vóru fleiri ferðir um reppið at bera vandamiklar støður við sær.

Tað var luturin hjá ÍF at mynda spælið. Teir royndu, men tað gekk illa hjá teimum at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Eftir at B68 var komið á odda, var tað í longum løtum so at siga spæl til eitt mál. Fleiri ferðir lógu innleggini væl, men oftast restaði tann, sum skuldi stýra bóltinum í málið, og tá ið tað endiliga eydnaðist at møta innlegginum, so fór bólturin skeivu megin stólpan.

Besta møguleikan fekk ÍF miðskeiðis í 2. hálvleiki. Jan Skoradal royndi at bróta ígjøgnum, Jóhan Dávur Højgaard, tóktist gera obstroktion dygst innanfyri brotsteigar samankomingina, men dómarin metti brotið til ellivu metra spark. Ken Bærentsen hevur verið fastur brotssparksskjútti hjá ÍF. Hann fór tíðliga út við skaða. Aftasti verjuspælarin, Áki Petersen, fekk uppgávuna, men royndin var ikki góð, og tað var barnamatur hjá Mortani Hansen at tveita seg til høgru fyri seg sjálvan og bjarga.

### Dysturin í tølum

***B68–ÍF 1–0 (0–0)***
1–0: Aksel Højgaard



B36-B68 0-2 (0-1):

# Toftamenn væl fyri

**B68 søkti allar gulldreymir hjá B36 við einum fult uppibornum sigri í Havn, og nú eru toftamenn teir, sum eru næstir oddaliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað var fyri tað mesta B68, sum var omaná ímóti B36, og tá heimaliðið so eisini misti John Petersen, var ikki meira bit eftir. Toftamenn eru nú teir, sum eru næstir HB í oddastríðnum*

*savnsmynd*

Eftir tapið fyri EB/Streymi fyri viku síðani var einki at ivast í, hvussu treytirnar hjá B36 vóru. Skuldi liðið framhaldandi fylgja við oddaliðnum úr HB, so kravdust trý stig, tí tað kundi so ikki roknast við, at HB fór at missa nakað inni á Skála.

B68 var tó ikki komið til Havnar at leggja seg niður. Toftamenn taldist ikki millum liðini, sum fólk flestu undan kappingarárinum roknaðu við skuldu liggja í oddinum, men teir hava tó verið treystir. So við og við eru stig alla tíðina komin inn á kontina, og serstakliga í verjupartinum hevur liðið verið framúr.

### Skiftandi spæl

Fyrstu løtuna var tað tó ikki sjónligt, hví hetta hevur verið so. Við at breiða spælið út í bæði borðini eydnaðist fleiri ferðir B36 at leggja bóltar inn fyri málið, har Albert Svævarsson tóktist hava óvanliga stórar trupulleikar. Hinvegin vístu toftamenn eisini tenn, og eitt nú mátti ein meistarlig bjarging frá Tróndi Vatnhamar til, fyri at forða Jann Inga Petersen í at skora við langskoti, og eisini Fróði Benjaminsen og Øssur Hansen høvdu naskar skotroyndir, sum tó heldur ikki funnu vegin fram til meskarnar.

So við og við fekk B68 tó nakað, sum líktist einum yvirtakið. Verjuspælið gjørdist alt meira sannførandi, og og á miðvøllinum høvdu Øssur, Fróði og Jann Ingi munandi betri tak á spælinum, enn Jens Kristian, Klæmint og Jákup. Hartil var eisini sjónligt, at leikbannið hjá Allani Mørkøre órógvaði B36 verjuna meira, enn gott var. Hetta hevði fingið Ion Geolgau at umskipa verjupartin, og ikki minst kom tað illa við hjá B36, at Rúni Elttør hevði stórar plaseringstrupulleikar í vinstra borði, har móstøðumenninir á einfaldan hátt fleiri ferðir megnaðu at spæla seg ígjøgnum.

Tað var tó úr hinum borðinum, at fyrsta málið í dystinum kom. Jann Ingi sendi Øssur Hansen avstað í vinstra borðið. Fyrrverandi landsliðsmaðurin var hart kroystur, men úr horninum fekk hann kortini sent bóltin innfyri. Sendingin lá nær málinum, og ivaleyst átti Tróndur Vatnhamar at komi út eftir bóltinum, men tá hetta ikki hendi, kundi Súni Fríði úr stuttari fjarstøðu seta høvdið á.

### Breiddin restar í

Og so gjørdist alt so nógv truplari hjá B36. Seinsta korterið undan steðginum royndu teir at trýsta, men tað gekk framvegis sera striltið at spæla seg fram til veruligar málmøguleikar. Nakrar ferðir var tó av álvara vandi á, tá spælið hevði hug at klumpa seg saman í B68-brotsteiginum, men hinvegin lúrdi vandin fyri kontra eisini alla tíðina. Og John Heri Dam átti kanska at punkterað dystin, tá hann í kapprenning við Fróða Clementsen slapp leysur, men Tróndur Vatnhamar kom enn einaferð væl út úr málinum.

At B36 ongan tíð megnaði at skapa sama trýst eftir steðgin, hevði sínar heilt einføldu orsøkir. Fyrst og fremst at John Petersen ikki kendi seg heilt væl, og tí ikki kom á vøllin eftir steðgin. Hartil kom so eisini, at Pól Thorsteinsson eftir eitt trælær heldur ikki sá seg føran fyri at spæla, og tí misti B36 verjuálitið, samstundis sum Jens Kristian Hansen noyddist av miðvøllinum.

Og tað er helst júst í hesum, at stóri trupulleikin hjá B36 í ár hevur verið. Sjálvandi er tað ikki bara at siga tað, tá avloysarar skulu finnast fyri John Petersen og Pól Thorsteinsson, tí talan er hóast alt um tveir av teimum allar bestu í føroysku kappingini. Men veruleikin er samstundis, at B36 ikki hevur ein skiftisbonk, sum borgar fyri eini støðu í oddinum. Var FM-kappingin bert ein dystur millum teir fyrstu ellivu, so er lítil ivi um, at B36 hevði verið heilt frammi í oddinum, men tá talan so er um leikara nummar 13, 14 og 15, verður liðið skert ov nógv, í einum longum kappingarárið er tað ikki nøkur haldgóð støða.

### Líkist einum topp-liði

Hjá B68 er talan kanska heldur ikki nakran breiðan hóp, men sæð ið mun til útgangsstøðið fyrr í ár, so er talan um munandi tilgongd. Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen, John Heri Dam og Súni Fríði Johannesen eru allir leikarar, sum pynta um ein og hvønn fyrstudeildarhóp í landinum, og yvir høvur tykist ilt at fáa eyga á nakað veikt punkt á liðnum yvirhøvur. Royndirnar hjá hópinum komu eisini til sjóndar í seinna hálvleiki sunnudagin, tí hóast B36 skapti millum lítið og einki, so lótu toftamenn seg ikki lokka niðaneftir uttan víðari. Heldur bíðaðu teir eftir avgerandi møguleikanum, sum kundi koma, og tjúgu minuttir fyri leiklok bundu teir so um sekkin.

Klæmint Matran var ikki nóg ansin, tá bólturin varð spældur beint á hann, og í roydunum at vinna bóltin aftur, framdi hann fríspark móti Fróða Benjaminsen. Frísparkið varð sent innfyri, og tá B36 ikki fekk ruddað nóg væl burtur, var John Heri Dam fyrstur á og langaði bóltin í kassan.

Og fyri B68 var hetta staðfestingin av, at liðið nú av álvara hevur bityið seg fast í oddin. Og eftirhondini er eisini torført at síggja, hví teir ikki eisini framhaldandi skulu vera ein partur av hesum.

Komandi dystirnar skulu teir spæla móti ávíkavist KÍ á heimavølli og FS Vágum á útivølli. Tveir dystir, har liðið á pappírinum hevur góðan møguleika fyri fullari úrtøku, og megna teir tað, so kann væl vera, at teir eru enn tryggari á silvurplássinum. Enn er kanska dekan ov langt upp á oddasessin, har HB aftur styrkti um sína støðu, men eitt silvurmerki man eisini vera væl meira enn tað, sum fólk á Toftum høvdu roknað við undan kappingarbyrjan.

### B36-B68 0-2 (0-1)

0-1: Súni Fríði Johannesen, 34
0-2: John Heri Dam, 69

**Dómari:** Niclas á Líðarenda. Lat fyri tað mesta leikarnar sjálvar um at avgreiða dystin, og fyri tað allar mesta gekk hetta eisini væl.
**B36:** Tróndur Vatnhamar – Kenneth Jacobsen, Fróði Clementsen, Pól. Thorsteinsson, Rúni Elttør – Klæmint Matras, Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen – Bárður Mortansson, John Petersen, Heðin á Lakjuni
**B68:** Albert Svævarsson – Dánjal Hansen, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen, Arnbjørn Danielsen – Bogi Petersen, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Súni Fríði Johannesen.